# „Stjala“ 800.000 krónur frá fakfeløgunum um árið

*Ímóti teirra vilja noyðast føroysk fakfeløg at betala landskassanum yvir 800.000 krónur um árið. Og fyrsta dagin kunnu bæði Løgting og landsstýrið vænta sær mótmæli*

Áki Bertholdsen



*Andrias Djurhuus í Vági reisti eitt mál á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag, sum hevur leingi hevur elvt til stóra misnøgd. Og nú kunnu bæði Løgting og Landsstýrið vænta sær eitt hvassorðað mótmæli frá Føroya Arbeiðarafelag*

Hvørt ár„stjelur“ landskassin yvir 800.000 krónur frá teimum føroysku fakfeløgunum.

Men nú fara fakfeløgini at royna at fáa peningin aftur.

Tað var Andrias Djurhuus úr Arbeiðsmannafelagnum Framtíðini, í Vági, sum reisti hetta málið á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Og tað vísti seg, at vágbingurin hevði rakt eitt eymt mál, tí tað stóðst rættiligt kjak burturúr og tað var skilligt, at hetta var eitt nakað, sum hevði vakt rættiliga øsing í hjá fakfeløgunum.

Andrias Djurhuus segði, at Arbeiðsmannafelagið Framtíðin hevði kort síðani fingið eina rokning frá Toll- og Skattstovuni fyri umsiting av frítíðargrunninum.

Enn hevði Framtíðin ikki goldið rokningini. Hann helt at rokningin var fullkomiliga órímilig og hann vildi hava málið umrøtt á aðalfundinum.

Ingeborg Vinther segði, at hetta var ein avleiðing av, at politikkararnir høvdu tikið umsitingina av frítíðarpeningunum frá fakfeløgunum.

–Fyrr var frítíðarpeningurin settur inn á bundna bók hjá fakfeløgunum.

Men í 1997 broytti løgtingið lógina so, at tað skuldi vera Toll- og Skattstovan, sum kom at umsita frítíðargrunnin.

Ypplýst varð, at lógin var farin at virka í fjør.

– Vit fingu at vita, at peningurin var tryggari í hondunum á Toll- og Skattstovuni, tí tá kundi hann ikki rørast til onnur endamál enn tað, hann var ætlaður til, nevniliga frítíðarløn, segði IngeborgVinther. Hesum vísti hon tó avgjørd aftur, tí peningurin varð settur inn á bundna bók hjá feløgunum og kundi heldur ikki rørast tá.

**Rokning uppá 800.000**

Men fakfeløgini sleppa ikki so, tí tað stendur eisini í lógini, at tey nú skulu betala Toll- og Skattstovuni fyri at umsita frítíðargrunnin.

Ingeborg Vinther segði, at so vítt hon hevði fingið upplýst, hevði Toll- og Skattstovan sent fakfeløgunum eina rokning uppá góðar 800.000 fyri at hava umsitið frítíðargrunnin fyri tey.

Men hon legði afturat, at at talan var um eina lóg og ein lóg mátti haldast.

– Tað einasta vit kunnu gera, er at royna at fáa politikararnar at broyta lógina aftur, segði formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag.

Aðalfundurin samtykti, at Føroya Arbeiðarafelag skuldi skriva mótmæli til Løgting og Landsstýri ímóti hesum umsitingargjaldinum og skuldi royna at faa lógina broytta aftur, so at feløgini sjálvi fingu frítíðargrunnin aftur at umsita.

Og Osmund Berg úr Skopun mælti til at leggja heilt kontant út fyri at fáa gjaldið burtur, sum hann málbar seg.

**Vóru í øðini**

Nógv umboð fyri fakfeløgini duldi ikki, at tey vóru í øðini inn á hesar rokningarnar frá Toll- og Skattstovuni og tað vóru meiri enn ein, ið rætt og slætt samanbar hetta við stuldur.

–Okkurt felag hevði betalt Toll- og Skatt næstan 40.000 krónur í umsitingargjaldi í fjør og tað hildu tey líktust „púra etandi ongum“.

Fleiri fakfelagsumboð vísti á, at rentan av Frítíðarfgrunninum hevði verið eitt ógvuliga kærkomið íkast í kassan hjá nógvum fakfeløgunum.

– Tá íð fakfeløgini mistu frítíðargrunnin, mistu tey eisini rentuinntøkurnar av honum. Og nú,vit eisini skulu betala umsitingargjald, er tað eitt álvarsligt fíggjarligt bakkast, ikki minst tey smáu feløgini, segði Karla Einarsson. úr Runavík. Hon helt, at hetta var eitt tiltak, sum einans varð sett í verk fyri at máa støðið undan fakfeløgunum.

# Arbeiðsgevarar misbrúka ALS til at betala fyri teir

*Í fleiri førum hevur tað gingið strilti at fáa arbeiðsgevarar at halda sáttmálan og ofta hevur tað verið neyðugt at seta hart ímóti hørðum, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag*

Áki Bertholdsen



*Tá ið arbeiðsfólk verða søgd upp, hava tey rætt til uppsagnarløn frá virkinum. Men tað kemur ofta fyri, at arbeiðsgevarar royna at fáa ALS at betala hesa uppsagnarlønina. Her eru tað Elias Hansen, næstformaður, IngeborgVinther, formaður, Tana Kallsoy, fráfarin stjórnarlimur og Marius Clementsen, stjórnarlimur*

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið segði Ingeborg Vinther, at tey hava havt nógvar kvalir av nógvar kvalir av arbeiðsgevarum, sum ikki vilja halda sáttmálan.

– Eitt nú kemur tað meiri enn so fyri, at arbeiðsgevarar royna at skáka sær undan sáttmálanum og at fáa ALS at betala uppsagnarløn fyri teir.

Tá ið arbeiðsfólk verða søgt upp, hava tey uppsagnarløn, eins og øll onnur og hon kann vera upp í 20 dagar, alt eftir, hvussu leingi, tey uppsøgdu fólkini hava arbeitt.

Men hesa uppsagnarlønina eru tað fleiri arbeiðsgevarar sum royna at snúgva sær undan. Ístaðin royna teir at vísa fólkinum til ALS, tá ið tey verða søgd upp

Ingeborg Vinther sigur, at tað eru ikki meiri enn nakrir heilt fáir dagar síðani, at eitt prógva afturat fekst um hetta

Talan var um eitt fiskavirki, sum hevði lagt um til høgligari arbeiðslag ella rationaliserað.

– Í tí sambandinum vórðu 17 arbeiðsfólk søgd upp,

– Men virkið sýtti fyri at gjalda uppsagnarlønina, tí tað skuldi ALS gjalda. Tvs, at fólkini skuldu beinanvegin beinast upp í ALS, hóast tey áttu uppsagnarløn fra virkinum.

Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur, at hetta, at fleiri arbeiðsgevarar halda, at ALS skal gjalda uppsagnarløn, er ein avleiðing av tí, ið hendi á Fiskavirking í Fuglafirði.

– Føroya Arbeiðarafelag tapti eitt gerðarrættarmál í tí sambandi og tí slapp Fiskavirking undan at gjalda hesa løn. Grundgevingin var, at tey vóru søgd upp, tí trot var á rávøru og tá skuldi virkið ikki gjalda uppsagnarløn.

Ingeborg Vinther leggur stóran dent á, at fakfelagsfólk hava eitt vakið eyga við slíkum.

– ALS er ætlað til at gjalda arbeiðsloysi, ikki uppsagnarløn. Men her halda summir arbeiðsgevarar seg hava ein møguleika at skáka sær undan sáttmálanum, men tað má steðgast, sigur Ingeborg Vinther. Hon leggur afturat, at eftir at Føroya Arbeiðarafelag kom uppí málið við áðurnevnda arbeiðsgevara, er tað komið í rættlag.



# Konsert hjá útisetakórinum Mpiri

Leygardagin 1. apríl kl. 16.00 hevur Mpiri konsert á Foyerscenen í mentanarstovninum Huset í Magstræde.

Kórið Mpiri er eitt føroyskt kamarkór, ið hoyrir heima í Keypmannahavn og er samansett av 14 útisetum. Kórleiðari er Bogi Mouritsen. Mpiri varð stovnað á vetri 97-98, tá nakrir sangarar úr Húsakórinum tóku seg saman um at gera eitt minni kór, ið skuldi leggja seg eftir at syngja nýggjan kórtónleik.

Hvat hugtakið 'nýggjur kórtónleikur' umfatar er eitt sindur torført at siga, og tað sæst eisini aftur á sera fjølbroyttu sangskránni hjá kórinum: Mpiri hevur sungið jazzútsetingar, klassiskan tónleik, norðurlendskt tilfar, rokk, og á komandi konsertini á Foyersenuni strekkir skráin seg frá Strawinsky um føroyskan kingosang í modernaðari útseting og vokalpopp til kórverk, sum eru skrivað serliga til Mpiri.

Í viðtøkum kórsins stendur m.a., at: Kórið ynskir at eggja teim føroyingum, sum fáast við tónasmið, at skriva og leggja til rættis tónleik fyri kóri. Fyri at røkka hesum aðalmáli hevur kórið bílagt fimm verk eftir unga føroyska tónaskaldinum Tróndi Bogasyni, sum í løtuni gongur á komponistadeildini á Københavns Konservatorium, og sum hevur serligt tilknýti til kórið.

Á vári í fjør skipaði Mpiri fyri árligu Norðatlantisku Kórstevnuni fyri útisetar úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi, ið kórleiðararnir John Høybye, Sunleif Rasmussen og Marianne Clausen stjórnaðu. Á stevnuni luttóku 150 sangarar, og hon var sera væleydnað. Tá framførdu vit tað fyrsta av verkum Tróndar, kórútsetingina av rokklagnum Apokalypsa hjá Terja og Føstufressum, sum síðani er vorðið eitt slag av eyðkennislagi hjá Mpiri.

Kórið hevur tilknýti til føroysku kirkjuna í Keypmannahavn (Samuelskirkjuna) og hevur haft fleiri konsertir har, í Føroyahúsinum og aðrastaðni, men hesaferð vildu vit gera nakað heilt serligt burturúr. 1. apríl hevur kórið Mpiri tí konsert á Foyerscenen, har fleiri av áðurnevndu verkum verða frumframførd. Konsertina hava vit vant fram ímóti síðani septembur '99.

Tað mest krevjandi verkið á komandi konsert verður Asbest, har kvæðastev rennur samman við rapp, nýmótans harmonium og indianarasangi. Eisini er eyðkennandi fyri hesa konsertina, at bara umleið helvtin av skránni verður sungin av øllum kórinum. Undir konsertini verður kórið í heilum býtt upp í smærri bólkar, sum hvør sær syngja smáar kompostitiónir.

Til at gera framførsluna enn meira spennandi hevur kórið arbeitt við rørslum og ymsum kóruppstillingum. Úrslitið av hesum royndum sæst á konsertini á Foyersenuni, tá Mpiri eisini hevur fingið ljóstøkningin Egil Barclay Hansen at skapa huglag við ljósi og klædnalistafólkini hjá Pau at evna serligar búnar til kórið.

Umframt góðu ljóðumstøðurnar á Foyersenuni, so er ein kafé knýtt at staðnum, sum ger tað møguligt hjá kórinum at fáa ein serligan kaféhugna sum karm um framførsluna. Í staðin fyri eyðkendu umstøðurnar til eina kórkonsert, har fólk sita pinnastill á hørðum stólum í samfullan tíma og lurta, so er meiningin til hesa framførsluna, at áskoðararnir skulu kunna hugna sær og njóti sangin afturvið einari øl ella einum kaffimunni

Sum eitt eyka pluss hevur kaféin gjørt licensavtalu við Føroyahúsið um at selja Føroya Bjór, so til ber at fáa bæði føroyskt øl, umframt alt tað, sum kaféin annars hevur at bjóða.

Í heyst er ætlanin at fara út at ferðast við verkunum og kórskránni, sum vit hava sett saman til hesa konsertina.

## Minningarorð um Súsonnu Hansen



Tað kennist løgið at skriva minningarorð um teg, góða Súsanna. Hví tú skuldi doyggja, bert 19 ára gomul, er torført at skilja. Fyri okkum tykist tað meiningarleyst, men tín tími var komin.

Tað er ógvuliga torført at byrja aftur í skúlanum, nú tú ikki longur er millum okkum. Tá hurðin gongur, hyggur man fyri at vita, um tú ikki kemur gangandi inn í floksstovuna. Tað kann ikki passa, at tú ikki kemur aftur. Av okkum øllum í flokkinum var tú tann, sum hevði studentarhúgvuna mest uppiborna. Tín hugur var til bøkurnar, og tú kláraði teg eisini sera væl. Tú visti akkurát, hvat tú skuldi gera, tá tú í summar bleiv liðug við skúlan.

Einasta troyst, ein hevur í hesu sváru tíð, er at tú er komin heim til Jesus. Eg gleði meg at síggja teg aftur í himli – tú, sum altíð var so smílandi og glað. Eg vil takka tær fyri trý góð vinaár. Eg fari at sakna teg ógvuliga nógv, men eg veit, at tú er komin til eitt betri stað.

Friður verið yvir minninum um vinkonu mína, Súsonnu.

**Crista**


## ÁRSAÐALFUNDUR OG KUNNANDI FUNDUR Í FØROYSKA OLJUFELAGNUM P/F ATLANTIC PETROLEUM

Atlantic Petroleum bjóðar øllum partaeigarum felagsins til ársaðalfund og kunnandi fund, um komandi virksemi felagsins, á Hotel Føroyum 31. mars 2000 kl. 1700.

Felagið fer, sum partur av samtakinum The Faroes Partnership, at taka lut í fyrsta føroyska útbjóðingarumfarinum.

Eftir partapeningshækkingina á heysti 1999, er partapeningurin nú kr. 46.250.000. Talið av partaeigarum er nú gott 2000.

Í 1999 hevur Atlantic Petroleum bert havt inntøkur, ið stava frá kapitalavkasti. Úrslitið, áðrenn skatt, gjørdist eina slaka millión.

Á kunnandi fundinum fara umboð fyri The Faroes Partnership, at greiða frá útlitunum fyri oljuleiting við Føroyar, og vísa á møguleikar og árin, ið koma at standast av hesum nýggja virksemi.

Tað hevur týdning at møta í góðari tíð, soleiðis at fundarluttakararnir kunnu skrásetast.

*Fundurin er í tveimum:*

*1. Ársa›alfundur sbrt. vi›tøkunum*

- Frásøgn nevndarinnar um virksemi felagsins í farna roknskaparári.
- Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
- Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkendaroknskapin og ársfrágreiðing.
- Val av nevnd.
- Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur erlokin.
- Uppskot til broyting i §2 stk. 3 nr. 1, í viðtøkum felagsins, soleiðis at persónar, sum í einum samanhangandi tíðarskeiði í minst 1 ár tey seinastu 20 árini, hava uppfylgt treytirnar í nevndu grein, kunnu gerast partaeigarar í felagnum.
- Mál, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja til viðgerðar.

*2. Kunning til partaeigarar*

- Jarðfrøðisliga søgan um føroyska økið.
- Gongdin við oljuleitingini vestan fyri Hetland
- Leitivánir við Føroyar
- Ætlanir hjá ”The Faroes Partnership”
- Føroysk luttøka í virkseminum
- Leikluturin hjá Atlantic Petroleum

Atlantic Petroleum

P.O.Box 1228, Bryggjubakki 4
FO 110 Tórshavn
www.petroleum.fo

stephanssons hús